# Vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum

Arbeiðsumhvørvi

# Broytingar á arbeiðsplássinum

Mei 2018

## Hvat er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum?

Endamálið við vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er at vegleiða, hvussu ásetingar í lóggávu skulu skiljast/tulkast. Vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum
- greiða frá, hvussu krøvini í reglunum kunnu lúkast í royndum
- greiða frá vitan um at tulka reglur í sambandi við dómar
- greiða frá, hvussu viðkomandi lóggáva er samansett, og hvørji øki hon umfatar

## Er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum bindandi?

Vegleiðingar frá Arbeiðs-og brunaeftirlitinum eru ikki beinleiðis bindandi fyri virki, aðrir myndugleikar, trygdarskipanir e.o., men vegleiðingarnar tulka reglur (lógir og kunngerðir), sum eru bindandi.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskilað í eini vegleiðing.

Virkini kunnu loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðs- og brunaeftirlitið metir tá, um hesin háttur er eins tryggur og í samsvari við reglurnar.

## Meira kunning

Meira kunning og vegleiðing er at finna á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum - www.arb.fo

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið**

**Eirargarður 2, 2.hædd**

**FO-100 Tórshavn**

**+ 298 66 44 00**

**arb@arb.fo**

# Sálarligt arbeiðsumhvørvi og broytingar á arbeiðsplássinum

## Innleiðing

Flestu arbeiðspláss uppliva fyrr ella seinni broytingar av onkrum slag. Broytingar kunnu fevna um tillagingar, samanlegging, flyting, uppsøgn, starvssetan, endurskipan av virksemi, nýggja tøkni ella skipanir.

Broytingar kunnu vera byrjanin til eina jaliga menning bæði fyri starvsfólk og arbeiðsplássið, men verða tær ikki handfarnar rætt, kunnu tær hava keðiligar avleiðingar fyri sálarliga arbeiðsumhvørvið. Verða broytingarnar framdar skynsamt, rætt og við góðum samskifti millum leiðslu og starvsfólk, kann trivnaðurin á arbeiðsplássinum gerast enn betri.

| |
|---|
| Henda vegleiðing hevur sum endamál at økja um tilvitskuna um sálarligt arbeiðsumhvørvi í mun til umfatandi broytingar á arbeiðsplássinum og veita góð ráð um, hvussu tit kunnu tryggja eitt gott sálarligt arbeiðsumhvørvi, tá ið broytingar skulu fremjast. |

## Broytingar

Broytingar á arbeiðsplássinum er eitt breitt hugtak. Dømir um broytingar kunnu vera:

- Bygnaðarbroytingar
- Fólk verða søgd úr starvi
- Fólk verða sett í starv
- Deildir verða lagdar saman
- Arbeiðsplássið flytur í annað stað
- Nýggir arbeiðshættir skulu setast í verk
- Arbeiðsuppgávur verða øðrvísi býttar
- Nýggjar mannagongdir verða gjørdar
- Nýggjur stjóri ella leiðari verður settur

## Avleiðingar av broytingum

Broytingar á arbeiðsplássinum kunnu hava stóra ávirkan á sálarliga arbeiðsumhvørvið. Verða broytingarnar ikki rætt handfarnar, kunnu tær hava við sær keðiliga ávirkan á heilsu og trivnað hjá starvsfólki.

Broytingar fáa ofta starvsfólk at kenna seg ótrygg, tí at tey vita ikki, hvat ið er í væntu. Ógreiða kann verða um arbeiðsbýti, arbeiðsuppgávur, arbeiðsmongd og mong onnur viðurskifti. Hetta kann elva til strongd umframt aðrar keðiligar avleiðingar fyri heilsu og trivnaðin hjá starvsfólki. Ymiskt er tó, hvussu starvsfólk uppliva broytingarnar og hvørja ávirkan tær hava á einstaka starvsfólkið.

Broytingar, ið fevna yvir eitt longri tíðarskeið á minst 2 ár, kunnu føra til minni starvsnøgdsemi, minni áhuga fyri arbeiðinum, verri heilsu, størri kensluliga møði og størri sjúkrafráveru.

Starvsfólk venja seg ikki við broytingar, sjálvt um tey uppliva broytingar ferð eftir ferð.

## Sálarligt arbeiðsumhvørvi í miðdeplinum

Ein broytingartilgongd eigur at taka atlit til sálarliga arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkum.

Um sálarligt arbeiðsumhvørvi verður sett í miðdepil áðrenn, ímeðan og eftir at broytingarnar eru framdar, ber til at minka um keðiligu avleiðingarnar, ið broytingar kunnu hava fyri starvsfólkini.

Ein týðandi fortreyt fyri at fremja eina góða broytingartilgongd er, at arbeiðið við sálarliga arbeiðsumhvørvinum fer fram í góðum samstarvi millum starvsfólk og leiðslu á arbeiðsplássinum. Trygdarskipanin eigur eisini at hava lut í samskiftinum.

Kunning er serliga umráðandi í sambandi við skerjing av starvsfólkatali, og um arbeiðsplássið skal lata aftur. Starvsfólk eiga at verða kunnað um, hvussu umfatandi skerjingarnar verða, hvussu nógv starvsfólk verða koyrd úr starvi og hvørji tey eru. Kunning um hesi viðurskifti eigur at verða givin tíðliga í tilgongdini. Um nakað starvsfólk upplivir vandan fyri at missa starvið sum serliga tyngjandi, eigur leiðslan at taka hond um hesi. Strongdarreaktiónirnar kunnu eisini tálmast við at bjóða

teimum starvsfólkum, ið verða søgd úr starvi, serkøna ráðgeving og stuðul í sambandi við nýtt starv og møguliga eftirútbúgving.
Tað hevur stóran týdning, at øll taka ábyrgd og taka lut í samskiftinum um sálarliga arbeiðsumhvørvið.

Í eini broytingartilgongd eru tað serliga trý viðurskifti, ið virka fyribyrgjandi móti neiligum avleiðingum av broytingartilgongdini. Hesi eru gott samskifti, inndragan av starvsfólki og stuðul og førleikamenning.



## Góð ráð, tá ið broytingar skulu fremjast

Niðanfyri kanst tú lesa tær 21 tilráðingarnar um, hvussu tað góða sálarliga arbeiðsumhvørvið kann varðveitast ígjøgnum eina broytingartilgongd.

Tilráðingarnar leggja dent á gott samskifti, at starvsfólk verða hoyrd og vird, tikin við uppá ráð og hjálpt og stuðlað ígjøgnum broytingartilgongdina. Tilráðingarnar byggja á nýggjastu vitan og royndir á økinum og eiga at verða nýttar sum íblástur og vegleiðing, tá ið umfatandi broytingar skulu fremjast.

## 21 GÓÐ RÁÐ

1. Leiðslan eigur at kunna starvsfólk um endamálið við broytingunum, um tørvin á broyting, um hvussu broytingarnar skulu fremjast, hvør tíðarætlanin er, hvørjar ágóðar ella fyrimunir broytingarnar fara at hava fyri arbeiðsplássið og starvsfólkið, umframt hvussu samskiftið um broytingarnar fer at fara fram.
2. Starvsfólk eiga at verða kunnað so tíðliga sum til ber í gongdini og eiga at fáa møguleika at greiða frá teirra áskoðanum, hugskotum og uppskotum.
3. Gevið gætur, at tá ið leiðslan kunnar um ætlaðu broytingarnar á arbeiðsplássinum, hevur leiðslan helst arbeitt við broytingunum í eina tíð, meðan hetta er nýggj kunning fyri starvsfólkið.
4. Kunningin frá leiðsluni eigur at vera gjøllig og leggja dent á tann týdning, ið broytingin hevur fyri arbeiðið hjá starvsfólkunum.
5. Leiðslan eigur at síggja til, at nokk av tíð og orku verður sett av til at tosa við starvsfólkini um broytingarnar og eigur at lurta væl eftir hugskotum, uppskotum og spurningum í sambandi við broytingarnar og gevið leypandi afturboðan.
6. Greiðar mannagongdir eiga at vera fyri, hvussu spurningar, ivamál og ótryggleiki hjá starvsfólki verða handfarin.
7. Leiðslan eigur at gera starvsfólkunum greitt, hvønn tey eiga at venda sær til við spurningum, ørkymlan og hugskotum til broytingarnar.

8. Gevið gætur, at millumleiðarar, starvsfólk og starvsfólkabólkar kunnu hava ymiskan tørv, tá ið broytingar fara fram, hetta kann vera í mun til samskifti, inndragan og stuðul, og at tørvurin kann taka seg upp ymiskar tíðir í gongdini.
9. Leiðslan eigur at gera sær greitt frammanundan, hvørjir møguleikar og vandar í sambandi við sálarligt arbeiðsumhvørvi kunnu standast undir broytingartilgongdini.
10. Leiðslan eigur at gera eina raðfestingarætlan yvir neyðug átøk til at menna tað jaliga og fyribyrgja møguligum vandum.
11. Trygdarskipanin eigur at vera samstarvspartur í øllum viðurskiftum, ið snúgva seg um arbeiðsumhvørvi.
12. Leiðslan eigur at gera sær greitt, hvat ið skal til fyri at brynja starvsfólkið til broytingarnar og eggja práti um, hvussu øll á arbeiðsplássinum kunnu brúka hvønn annan og styrkir hjá hvørjum øðrum. Verið uppbyggjandi og stuðlið hvørjum øðrum.
13. Leiðslan eigur at gera sær greitt, um arbeiðsplássið og trygdarskipanin hava neyðugu førleikarnar og vitanina til at kunna leggja ætlanir um, fremja og grundfesta broytingarnar, t.d. í mun til nýggj krøv í arbeiðinum og nýtt samstarv. Fáið upp í lag førleikamenning, so hvørt tørvur er á tí.
14. Prátið um, hvat kann gerast fyri at betra um sálarliga arbeiðsumhvørvið í sambandi við broytingina. Gerið greitt, um tørvur er á uttanhýsis hjálp.
15. Starvsfólk og starvsfólkabólkar eiga at verða tikin við uppá ráð tíðliga í broytingartilgongdini. Hetta er við til at skapa ognarkenslu og gott grundarlag fyri góðum sálarligum arbeiðsumhvørvi.
16. Gerið í samstarvi við viðkomandi partar leypandi uppfylging av broytingini og broytingartilgongdini og gerið at enda eina eftirmeting. Hetta er við til at skapa møguleikar fyri at tillaga tilgongdina og fremur lærdóm í mun til komandi broytingar.
17. Tær væntanir, ið starvsfólk hava um at verða tikin við uppá ráð, eiga at verða stemmaðar av við byrjan og leypandi. Tað er umráðandi at starvsfólk vita, hvat ið tey kunnu hava ávirkan á.
18. Leiðslan eigur at leggja dent á at vísa virðing fyri kenslunum hjá starvsfólki.
19. Arbeiðsplássið eigur at seta sær sum mál at gott sálarligt arbeiðsumhvørvi gerst ein natúrligur partur av arbeiðinum framyvir.

20. Tosið leypandi um broytingartilgongdina til tess at skapa yvirlit yvir tí, ið fer fram. Veitið kunning eisini tá ið einki nýtt er at fortelja. Hetta kann verða við til at sleppa undan ósannindum og leysatíðindum.
21. Leiðslan eigur at samskifta við starvsfólk um møguligan tørv á nýggjum førleikum og hvussu farið verður fram fyri at tryggja, at einstaka starvsfólkið hevur neyðugu førleikarnar at røkja arbeiðið eftir at broytingarnar eru framdar.